# Mannagongdir í sambandi við uppsøgn

Sambært Fyrisitingarlógini, skal hoyringsskriv sendast til tann, sum ætlanin er at siga úr starvi. Viðkomandi hevur í minsta lagi 14 dagar at geva sínar evt. viðmerkingar til hoyringsskrivið til arbeiðsgevaran – Starvsfólk kann tó hava krav um longri hoyringsfreist, tí tað, sum um ræður er, at starvsfólkið veruliga fær stundir at gera viðmerkingar sínar til ætlaðu uppsøgnina.

Starvsfólk kann eisini altíð biðja um skjalainnlit.

Felagið skal altíð smb. sáttmálanum – hava skrivliga fráboðan, um arbeiðsgevarin hevur ætlan at siga fólk úr starvi – har grundgevingin skal vera tilskilað, soleiðis at felagið fær mett um grundgevingina.

Heldur Føroya Pedagogfelag, at uppsøgnin ikki skal fremjast, ella at uppsøgnin ikki er nóg væl lýst, kann felagið krevja uppsøgnina viðgjørda á fundi við setanarmyndugleikan, áðrenn uppsøgnin verður givin.

Um ongar viðmerkingar eru til hoyringsskrivið, ella einki nýtt fyriliggur í málinum, og felagið ikki hevur nakrar viðmerkingar, kann uppsøgnin gevast við galdandi uppsagnarfreist. (Sí teigin ”Uppsagnarfreistir”.)
Uppsøgnin er altíð at rokna frá einum 1. í fyrstkomandi mánaði.

Viðmerkjast skal, at forvunnin frítíð smb. Frítíðarlógini ikki kann leggjast inn í uppsagnarfreistina.
Smb. Álitisfólkaavtaluni stk.7, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið, tá talan er um setan ella uppsøgn av starvsfólki.

**Uppsagnarfreistir**
Uppsagnarfreist smb. Starvsmannalógini § 2, stk.2:

| Starvstíð | frá arbeiðsgevara | frá starvsfólki |
|---|---|---|
| undir 6 mðr. | 1 mðr. | 1 mðr. |
| 6 mðr. upp til 3 ár | 3 mðr. | 1 mðr. |
| 3 – 6 ár | 4 mðr. | 1 mðr. |
| 6 – 9 ár | 5 mðr. | 1 mðr. |
| meira enn 9 ár | 6 mðr. | 1 mðr. |

**Uppsagnartíðin:**

| Um uppsagnartíðin skal vera | Skal uppsøgnin gevast áðrenn |
|---|---|
| 1 mðr. | 5 mán. setan |
| 3 mðr. | 2 ár og 9 mán. setan |
| 4 mðr. | 5 ár og 8 mán. setan |
| 5 mðr. | 8 ár og 7 mðr. setan |
| 6 mðr. | Aftaná 8 ár og 6 mðr. setan |